sonurin Sverri Egholm. Hann fór til familju á Glyvrum at verða hjá eini mostur. Hann gekk øll barnaárini í skúla har, og fór síðani á studentaskúla, og seinni til Danmarkar at lesa. Eftir loknan lestur flutti hann heimaftur til Føroya, og búsettist í Tórshavn, har hann gjørdist landsbókavørður. Sverri var eisini ein kend rødd í Útvarpinum, har hann javnan gjørdi sendingar ella las upp søgur. Sverri gjørdist eisini ein av eldsálunum í Meginfelag Áhugaleikara Føroya (MÁF), og spældi við í nógvum sjónleikum og einstøkum føroyskum filmum eisini. Hann giftist Onnu, ættað av Glyvrum, og búðu tey í Gundadali í Tórshavn. Sverri var í gongd við at skriva Vestmanna søgu, tá hann andaðist í 2001, hálvt ár eftir sín 70 ára føðingardag.

Mamma og pápi fingu í 1932 tvíburðarnar, Asbjørn og Reidar. Teir fóru á Føroya Barnaheim í Vestmanna, táið mamma bleiv sjúk, og vóru har nakrar ferðir, meðan hon lá á sjúkrahúsið. Reidar fór sum tilkomin at læra til bakara. Hann giftist til Klaksvíkar. Tvíburðabróðurin, Asbjørn, fór sum tilkomin at læra til skómakari, og hann sigldi eisini við fiskiskipum – m.a. Kap Farvel. Asbjørn giftist við Óluvu, ættað úr Kollafirði. Asbjørn er einasta av mínum systkjum, sum livir enn, og búgva hann og konan Uppi á Deild í Vestmanna.

Tað kann verða nevnt, at meðan Asbjørn misti pápan á sjónum, so misti Óluva fyrra mannin á sjónum. Hon var nevniliga gift við Sofus Skoralíð úr Dali, sum í 1955 doyði við íslendska trolaranum Egili Reyða, sum fór á landi uppí Ísafirði. Tað vóru yvir 30 mans við, meira enn helvtin vóru føroyingar. Tað doyði eisini fýra íslendingar. Tað verður roknað sum eitt bjargingarbragd av teimum stóru, at allir hinir vórðu bjargaðir.

## Mistu jólagávuna við jólaskipinum

Meg hevði mamma hjá sær mestu tíðina, men meðan hon lá á sjúkrahúsinum var eg í styttri tíðarskeiðum hjá familju í Leynum og hjá mostrini á Glyvrum. Men longst var eg tó hjá mammubeiggjanum og konu hansara Inni á Fjørð í Vestmanna, Andrea og Julius Olsen.

Eg minnist frá krígnum tann 27. september 1941, táið "Fram" var bumbað og søkt á Vestmanna. Eg stóð Inni á Fjørð og hugdi, og flogfarið fleyg beint Inn á Fjørð, tætt framvið húsunum. Fram varð rakt av tveimum bumbum. Í sama sekundi rendi ein dupultur vatngoysur seg himmalhøgt upp í luftina. Fram lætti sær á í sjónum eins og dró hon sín síðsta andadrátt og brotnaði so av um miðjuna. Hetta var ein ógvuslig sjón. Flogfarið royndi at gera meira um seg, men fekk tá dygga mótstøðu.





*Børnini hjá Gudrun og Jákup f.v. Sigmunda f. 1922, Jens Jákup f. 1926, Eivind f. 1928, Sverri f. 1930, Asbjørn og Reidar f. 1932 og Jastrid f. 1934. Innsett Alis, 1924. Myndin er tikin tríggjar dagar, áðrenn hon doyði.*

Sum børn blivu vit annars ávaraði um, hvussu tey skuldu fyrihalda seg, tá ið vandi var fyri týskum álopum. Varð gingið á vegnum skuldu vit tveita okkum í veituna við vegin. Tað var nokkso vanligt við týskum flogálopum júst um hesa tíðina, bæði áðrenn og aftaná, at Fram varð søkt. Men júst hesin dagur gjørdist serliga minniligur.

Eg havi eitt annað serligt minni frá krígnum. Beiggin Jens Jákup, sum búði í Onglandi, hevði keypt mær eina harmoniku og onkur smart klæði. Men hetta kom ikki fram. Skipið við pakkanum gekk burtur. Helst hevur tað verið jólaskipið.

Eg giftist sum 24 ára gomul til Sørvágs við Sigfred Hansen, har vit búsettust. Sigfred doyði í 2004.

## Jastrid fødd faðirleys

Annars greiðir Jastrid frá, at hon sjálvandi minnist einki til hesa hending, men sum hon vaks til, kom hon tó at kenna hvussu tað var ongan pápa at hava. Tað var ikki prátað nóg um hetta, men tó so mikið, at hon fekk eina kensla av, hvussu mamman og tey eldru systkini høvdu upplivað hetta.

Sum so ofta er, hevði mamman trupult við at góðtaka, at maðurin ikki fór at koma aftur. Hon noyddi seg leingi at trúgva, at manningin mátti hava bjargað sær á ein ella annan hátt, og tað gjørdi hon í fleiri ár.

Tey fluttu til Vestmanna í 1938, tá ið Jastrid var fýra ára gomul. Tey áttu onga jørð, og høvdu tí ikki kúgv og seyð. Men fólk vóru so hjálpsom. Vanligt var at keypa mjólk. Viðhvørt fingu tey mjólk frá fólki. Serliga væl minnist Jastrid til, tá ið fólk bóru teimum ketilost frá kúgv, sum júst hevði kálvað.

Jastrid dámdi eisini so væl saman við øðrum børnum at fara í hagan eftir neytum um kvøldarnar. Fyri hetta kundi hon fáa eina breyðflís frá fólki, sum áttu okkurt av neytunum, og sum hon rak fyri. Hetta kom eisini so væl við, at hon minnist tað enn!

Men tey høvdu hønir, settu eplir niður og skóru torv. Tað var langt at ganga, einir tveir tímar hvønn vegin. Hetta gav alt nógv arbeiði og øll máttu hjálpa til.

Men fólk vóru eisini hjálpsom. Tað var nógvur seiður í Vestmanna. Tá menn kastaðu nót fingu tey heim, sum høvdu mist forsyrgjaran, eisini sín part.

Sum Jastrid sigur: "Hóast truplar umstøður, so komu vit væl undan."

Jastrid kom at hava eitt lív, sum var vanligt hjá gentum. Sum heilt ung gekk hon við posti. Hetta var eitt arbeiði, sum ikki kundi forsømast. Sjálvt tann dagin, hon skuldi til altars aftaná konfirmatiónina, mátti hon fyrst við posti.

Hon var í húsi ymsa staðni. Hetta var ein góð skúling hjá nógvum gentum at gerast góðar matmøður.

Jastrid var eisini í Ìslandi og arbeiddi fisk, sum eisini var vanligt tá í tíðini. Hon arbeiddi eisini á trolvirkinum hjá Alfred Hummeland. Hetta var konufólkaarbeiði tá. Arbeiðið var bæði at knýta trolnet og at gera trolini til, og her var nógv at gera.

Jastrid gjørdist fiskimannakona. Maðurin Sigfred var til sjós meginpartin av sínum arbeiðslívi.

Børnini eru fimm í tali. Tann elsti Niels er føddur á einum so sjáldsamum stað sum hvíldarheiminum Naina. Føðingin gekk so skjótt, at stundir vóru ikki at koma á hospitalið. Næstu børnini eru tvíburarnir Jákup og Johannes. Síðan koma Jakoba og Sjúrður.

## Tilvildin bjarðaði manni úr Sandavági

Jákupi hjá Jastrid hevur eina serliga frásøgn, og greiðir hann soleiðis frá: "Eg eri uppkallaður eftir abba mínum, Jákup Egholm. Í 1984 giftist eg við Aibritt á Plógv. Stutt áðrenn vit giftust, vóru vit ein dagin inni og vitjaðu ommu og abba hennara. Tá abbin, Albert Thomassen í Sandavági, spyr, hvaðani eg eri ættaður, greiði eg honum frá hesum. Tá sigur hann: "So tú er abbasonur Jákup Egholm? Hann kendi eg væl, tí vit hava siglt saman við "Neptun"." Eg bleiv ikki sørt kløkkur, og spurdi hann so eitt sindur nærri um hetta. Hann greiddi mær frá um abba mín, og lat annars væl at honum sum skipsfelagi og kokkur.

Tað løgna við hesi søgu hansara var, at eftir røttum skuldi hann havt verið við "Neptun" henda túrin, hon hvarv. Men hann var blivin sjúkur stutt áðrenn, teir fóru avstað, og hevði tí verið noyddur at senda skiparanum avboð. Tískil fór ein annar maður við í staðin. So tað var av berari tilvild, at ikki abbar hjá bæði mær og konuni gingu burtur við sama skipi. Albert Thomassen var pápi at verpápa mínum, Jóhan á Plógv, sum var ein kendur skipari.

Vit takka Jastrid og Jákupi fyri teirra frásagnir. Hesar eru við til at skapa søguna um hesa stóru vanlukku fyri 75 árum síðani, so okkara eftirkomarar ikki skulu gloyma hana.

**Komandi partur**

Í komandi Miðviku verður millum annað fyrri partur av áhugaverdari frásøgn hjá Steingrim Kristoffersen, son skiparin á Neptun. Tá endurgeva vit eisini bræv sum Óla Jákup sendi heim úr Reykjavík stutt áðrenn teir gingu burtur.

Sosialurin